# Søluráðgevar til Trygd

**TRYGD leitar eftir tveimum søluráðgevum til privatdeildina.**

## Søludeildin

**STARVIÐ**

Talan er um sera spennandi og sjálvstøðugt starv, har uppgávur tínar eru at selja tryggingar og at ráðgeva fólki umvegis telefon. Arbeiðstíðin er fýra dagar um vikuna, frá mánadegi til hósdag millum kl. 16.00 og 22.00. Saman við starvinum fylgja møguleikar fyri útbúgving á tryggingarakademinum umframt innanhýsis søluskeið.

**TÚ**

Tú ert í bestu árum, fyrikomandi, dugir væl at selja, og telefonin og mussa-skøðið eru tínir bestu vinir. Tað er umráðandi, at tær dámar avbjóðingar, og at tú strembar eftir tí góða úrslitinum. Tú dugir at arbeiða bæði sjálvstøðugt og í samstarvi, og tú hevur sjálvandi handilsligan sans og vísir ábyrgd. Teldukunnleiki er ein fyrimunur.

## Heimavitjanir

**STARVIÐ**

Talan er um eitt sera sjálvstøðugt og spennandi starv, har høvuðsábyrgdin er at koyra út til verandi og komandi kundar, við sølu og kunning fyri eyga. Arbeiðstíðin er rættiliga frí, men fer helst at liggja millum kl. 16.00 og 22.00. Upplæring syrgir TRYGD fyri, og saman við starvinum fylgja møguleikar fyri útbúgving á tryggingarakademinum umframt innanhýsis søluskeið.

**TÚ**

Tær dámar avbjóðingar, og tær dámar væl at selja. Tú trívist væl við at arbeiða sjálvstøðugt, ert jasøgin, dugir at samstarva og tekur ábyrgd. Tú arbeiðir eisini skjótt og hevur handilsligan sans. Teldukunnleiki er ein fyrimunur.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**

Størvini verða sett og lønt eftir serstøkum sáttmálum. Lønin er samansett av eini góðari grundløn umframt bonus, um málini verða rokkin. Vit vilja seta størvini sum skjótast, men eru sinnað at bíða eftir røttu fólkunum. Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum, prógvum og upplýsingum um arbeiðsroyndir skal vera okkum í hendi innan 1. juni 2007. Send umsóknina til P/F TRYGD, Att.: Heidi P. Christensen, Gongin 7, Postboks 44, 110 Tórshavn, ella til hpc@trygd.fo.

**SOLEIÐIS ER TRYGD**

TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 35 fólk, og vit umseta í dag fyri meira enn 75 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO
UMSÓKNARFREIST ER 1. JUNI 2007

TRYGD leitar eftir tær.

REPROZ

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Ein vakstraravtala er ein avtala millum ymsar partar um, hvussu teir ætla at skapa búskaparvøkstur í einum øki í einum ávísum tíðarskeiði. Í avtaluni verður rættiliga nágreiniliga ásett, hvønn leiklut, hvør einstakur partur hevur. Talan er sostatt um eina greiða avtalu, har hvør partur veit, hvat hann skal gera, og hvat hinir partarnir gera. Soleiðis kann tryggjast, at arbeitt verður fram ímóti einum vældefineraðum felags máli, har allir partarnir eru samdir um málið og um hvussu tað skal røkkast.

*(Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur um vakstraravtalur)*

# Mugu fyrst

**Skal nakað trúvirði vera í ætlanini at gera eina vkstraravtalu fyri Suðuroy, er neyðugt vita, hvat vit hava av pengum til at fíggja avtaluna við Tað ein fullkomiliga misskilt, tá ið politikarar siga, at tað er óseriøst at biðja Løgtingið um pening, uttan at vita, hvat hann skal brúkast til. Tvørturímóti er tað óseriøst at fara undir arbeiðið, uttan at vita, hvussu nógvur pengingur er til taks, siga Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur**

VAKSTRARAVTALA FYRI SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Skal nakað sum helst trúvirði vera í arbeiðnum at fyrireika eina vakstraravtalu fyri Suðuroy, er tað ein fortreyt, at vit vita, hvussu nógvur pening er til taks at arbeiða fyri.

Tað staðfesta teir báðir, Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur.

Sum tað sæst í aðrari grein her á vinnusíðunum, hava kommunurnar í Suðuroy biðið teir báðar serfrøðingarnar vera við í einum arbeiði at menna vinnuna í



*Hvat skulu hesar hendurnar í Suðuroy gera í framtíðini. Vanligu flakavirkini vara neyvan at bjarga oynni, tí skal gongdin vendast, skal nógv meiri til. Tað hevur mangan verið nevnt, at tað er neyðugt at seta ein Suðuroyargrunn á stovn, men politikarar eru óseriøsir, tá ið teir ikki kunnu seta ein slíkan grunn á stovn, uttan at teir frammanundan vita akkurát, hvat peningurin skal brúkast til*

# Bólturin liggu

**Krøvini frá Jacobi Vestergaard til kommunurnar í Suðuroy er eitt sindur órímiligt. Men spurningurin er um, tað ikki hevði verið lættari hjá kommunum at eftirlíkað landsstýrismanninum, tí so var í hvussu so er ein snávingarsteinur minni at fara upp um**

VAKSTRARAVTALA FYRI SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ongin ivi um, at bólturin liggur hjá landsstýrismanninum í innlendismálum.

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur, eru av teirri sannføring, at skal nakað spyrjast burtur úr ætlaðu vakstraravtaluni fyri Suðuroy, er tað Jacob Vestergaard, sum hevur bóltin og eigur næsta leikin.

Á einum fundi umborð á Smyrli í oktober í fjør, varð tosað um at seta 50 milliónir í ein grunn til at fíggja eina vakstraravtalu fyri Suðuroy. Avrátt var, at býtið skuldi vera so, at kommunurnar í Suðuroy skuldu leggja 10 milliónir á borðið tey næstu fimm árini og landið 40 milliónir.

Fyri at staðfesta hetta, skrivaðu allir borgarstjórarnir í Suðuroy undir eitt viljunarskriv, har teir váttaðu at kommunurnar vóru sinnaðar at betala sín part.

Hetta viljunarskrivi varð handað landsstýrismanni-